# Yvirlæknar við serfrøði í neurologi

## Tvey størv sum yvirlæknar eru leys til setan sum skjótast ella eftir avtalu

**Medisinska depilsleiðslan** er samansett av leiðandi yvirlæknanum og leiðandi sjúkrarøktar-frøðinginum. Medisinski depilin er skipaður í 4 seingjarøki við hvør sínari deildarleiðslu. Harútyvir ambulatoriir, fysioterapi, ergoterapi og skrivarar. Umleið 150 ársverk eru á Medisinska deplinum.

**Ábyrgdarøki**
Medisinska depilsleiðslan hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina fyri samlaða raksturin hjá deplinum. Neurologisku yvirlæknarnir fáa ábyrgdina fyri leiðsluni av tí neurologisku funktiónini, innløgdum sjúklingum, ambulantum nýávísingum í samarbeiði við onnur sjúkrahús í Føroyum og í øðrum londum.

**Medisinski depilin** er mitt í einari størri menning, sum m.a. hevur við sær, at fleiri sjúklinga-viðgerðir verða tiknar heim frá Danmark til Føroyar. Omaná hetta er stovnsettur ein loyalur og ágrýtin yvirlækna-bólkur, sum samstarvar um allar tær medisinsku sergreinarnar. Tað er av stórum týdningi, at tú bæði hevur hug og evni til at samarbeiða í einum toymi, har loyalitetur og opinleiki eru grundarlag fyri avgerðum og handlingum. Vit vænta, at tú stuðlar og tekur uppá teg ein aktivan leiklut í granskingar-tiltøkunum hjá Med. deplinum, bæði lækna- og tvørfakliga.

**Neurologiin á Landssjúkrahúsinum**
Neurologiska funktiónin ræður yvir 8 neurointensivum sengrum til apopleksi, og 2 sengur til aðrar neurologiskar sjúklingar. Tað eru umleið 1.000 ambulantar vitjanir árliga og tann 1. apríl 2010 var stovnsett eitt neurologiskt ambulatorium við skrivara, sjúkrarøktarfrøðingi og skiftandi konsulentum, m.a. EEG-atstøðara og neurolog íroknað neurofysiologi. Mynda-diagnotiska orkan er í løtuni við CT- og MR-skannarum av eldra slagnum. Júst nú eru umbyggingar í gongd við tí fyri eyga, at vit fara at fáa nýggjar CT- og MR-skannarar. Harvið verður góðskan á hædd við tey donsku meginsjúkrahúsini.

**Serligt fyri hesi størvini**
Á Landssjúkrahúsinum ynskja vit, at avvarðandi yvirlæknarnir fáa eitt tætt samband við Neurologisk klinik á Ríkissjúkrahúsinum. Eyðkennið og vavið av samarbeiðinum kann avtalast ítøkiligt. Samstundis við, at størvini verða sett, verður tað framvegis møguligur tørvur fyri konsulenttænastum, so at vit náa eitt víðari neurologiskt netverk og framhald í tí fakligu dagføringini.

**Arbeiðsuppgávur**
- Samábyrgd fyri dagliga rakstrinum og starvsfólkatrivnaðinum innan neurologiska økið
- Er limur av leiðslubólkinum í Medisinska deplinum
- Orða og eftirmeta mál fyri neurologisku sergreinini innan teir fíggjarligu karmarnar
- Seta neurologiska gransking í gongd, góðskutrygging og menning fakliga og tvørfakliga
- Iverkseta og møguliga tillaga gjørdar neurologiskar sjúklingagongdarlýsingar
- Taka sær av øllum kliniskum neurologiskyn funktiónum á innlagdar og ambulantar sjúklingar, herundir visitatión
- Møgulig vaktskylda kann avtalast nærri

**Førleikakrøv**
- Serlækni í neurologi
- Leiðsluroyndir
- Hevur ein heilsutilfeingis- og búskaparligan hugburð
- Kann hugsa skapandi og virka taktiskt og langskygt
- Kann planleggja og skipa sjúklingagongdina í sergreinini munagott

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður innsett eftir avtalu millum FAS og Fíggjarmálaráðið. Serligu korini verða avtalað einsæris í samstarvi við Ríkis-sjúkrahúsið og Landssjúkrahúsið.

**Meira kunning** um størvini eru at fáa við at venda sær til Tummas í Garði, yvirlækna og varastjóra, t-postur: lstumga@ls.fo, telefon 234592 ella til Bjarna á Steig, depilsleiðara, t-postur: lsbjast@ls.fo, telefon 234525

**Umsóknarfreistin er 31. mars 2011**





Trivnaður

Størv á Landssjúkrahúsinum

Sjúklingurin í miðdeplinum

Gransking & menning

www.ls.fo

### Áður lýst størv:

**Læknaskrivari til Røntgen**
Umsóknarfreistin er 15. mars 2011

**Læknaskr. til Neurol.amb.**
Umsóknarfreistin er 22. mars 2011

**Umsitingarfulltrúi**
Umsóknarfreistin er 18. mars 2011

**Læknaskrivaranæmingar**
Umsóknarfreistin er 4. apríl 2011

**Introstarv í Pædiatri**
Umsóknarfreistin er 12. apríl 2011

# Sjúklingasamskipari til Uttanlandstænastuna

## Landssjúkrahúsið hevur sett á stovn eina Uttanlandstænastu, har endamálið er at miðsavna tær dagligu uppgávurnar í samband við, at sjúklingar fara uttanlands

Tí lýsa vit eftir einum sjúklingasamskipara, sum eisini skal verða leiðari av økinum. Talan er um eitt fyribilsstarv í 2 ár.

Viðkomandi skal hava ábyrgdina av, at tryggja at sjúklingar, fáa eina vælskipaða, hóskandi og skjóta sjúklingagongd. Uppgávan at samskipa, optimera, planleggja og góðskutryggja sjúklingagongdina í samband við serviðgerð uttanlands er í tøttum samstarvi við avvarðandi yvirlæknar, sjúkrahús og Heilsumálaráðið.

Sum leiðari av økinum skal tú verða við til at grunda virksemið, samstundis sum arbeiðast skal við at menna og betra sjúklingagongdina. Tú hevur eisini starvsfólkaleiðslu og fíggjarliga ábyrgd av lønarjáttanini í eindini.

Uttanlandstænastan verður skipað sum ein stabseind og vísir til sjúkrahússtjórnina.

**Ábyrgd og myndugleiki:**
- Tryggja at sjúklingar fáa eina vælskipaða, hóskandi og skjóta sjúklingagongd
- Tryggja neyvt samstarv og samskifti við avvarðandi yvirlæknar, sjúkrahús, viðgerðarstøð, sjúklingahotel, flutningsfeløg og aðrar samstarvspartar
- Tryggja at fyrisitingarligar mannagongdir verða fylgdar, og at skrásetingar innan serviðgerðina verða gjørdar og mentar
- Ábyrgd av og tryggja, at Uttanlandstænastan virkar í samsvar við mál og virðisgrundarlagið fyri Landssjúkrahúsið
- Ábyrgd av at fylgja lógini um sjúklingarættindi
- Ábyrgd av, at lønarjáttanin svarar til tørvin og verður hildin
- Ábyrgd av fíggjarstýring av lønarútreiðslum á økinum
- Ábyrgd av, at tryggja at tøl og data sum eru grundarlag fyri framrokningum eru álítandi
- Seta mál fyri virksemið á Uttanlandstænastuni
- Standa fyri starvfólkaleiðslu og menning og virka fyri trivnaði

**Førleikakrøv:**
- Royndir/áhuga innan arbeiðið við sjúklingagongdum
- Útbúgving/royndir innan leiðslu og fyrisiting
- Viðkomandi heilsufakligi grundútbúgving er ein fyrimunur
- Góð leiðslu-, samskiftis- og samstarvsevni, bæði munnlig og skrivlig
- Góð greinandi evni, framskygni og hava visjónir
- Teldukunførleiki

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum tú sjálv/ur ert við til at skapa
- ein ágrýtnan leiðara- og starvsfólkahóp við góðum íblástri
- eitt sjúkrahús við aktivum starvsfólkapolitikki og strategiætlan, sum m.a. raðfestir leiðslu- og starvsfólkamenning høgt

**Lønar- og setanartreytir** eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag

**Nærri upplýsingar um starvið eru at fáa við at venda sær til:**
Nainu Túgvustein, varastjóri, tlf. 304599, lokal 1003, t-postur: naina@ls.fo
Tummas í Garði, varstjóri, tlf. 304599, lokal 1002, t-postur: lstumga@ls.fo

Starvslýsing sæst á www.ls.fo undir „leys størv"

**Umsóknarfreistin er tann 28. mars kl. 12.00**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið***
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
***FO-100 Tórshavn***

***Ella á teldupost adressu:***
***umsokn@ls.fo***